Yvirlit yvir broytingar á Kærustovninum

1998
Kærunevndin í almannamálum
Landsskattakærunevndin
Meirvirðisgjaldskærunevndin
Tollkærunevndini

2000
Kærunevndin í almannamálum
Landsskattakærunevndin
Meirvirðisgjaldskærunevndin
Tollkærunevndini
Kærunevndin hjá Studna

2003
Kærunevndin í almannamálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna

2005
Kærunevndin í almannamálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin

2006
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin

2007
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum

2008
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin

2009
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin
Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin

2015

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin
Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin

2016
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin
Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin
Kærunevndin hjá ALS
Kærunevndin hjá Barsilsskipanini

2018
Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin
Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin
Kærunevndin hjá ALS
Kærunevndin hjá Barsilsskipanini

2021
Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum
Skatta- og avgjaldskærunevndin
Kærunevndin hjá Studna
Skuldarumskipanarnevndin
Kærunevndin í lendismálum
Vinnukærunevndin
Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin
Kærunevndin hjá ALS
Kærunevndin hjá Barsilsskipanini
Tvingsilsnevndin

2022
Almanna-, familju- og heilsumál
Skatta- og avgjaldsmál
Lestrarstuðulsmál
Skuldarumskipanarmál
Lendismál
Vinnumál

Psykiatriska Sjúklingakærunevndin
Fjølmiðlanevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin
Kærunevndin hjá ALS
Kærunevndin hjá Barsilsskipanini
Tvingsilsnevndin

2023
Almanna-, familju- og heilsumál
Skatta- og avgjaldsmál
Lestrarstuðulsmál
Skuldarumskipanarmál
Lendismál
Vinnumál
Psykiatriska Sjúklingamál
Barnaverndarmál
Arbeiðsloysisskipanarmál
Barsilsskipanarmál
Tvingsilsnevndin

2024
Almanna-, familju- og heilsumál
Skatta- og avgjaldsmál
Lestrarstuðulsmál
Skuldarumskipanarmál
Lendismál
Vinnumál
Psykiatriska Sjúklingamál
Barnaverndarmál
Arbeiðsloysisskipanarmál
Barsilsskipanarmál
Tvingsilsmál
Náttúruverndarmál

Yvirlit yvir málsøki hjá Kærustovninum 1. januar 2024

Í almanna-, familju og heilsumálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum – t.d. um veitingar og tænastur
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi – t.d. um fylgjara í.s.v. sjúkuviðgerð uttanlands
- Avgerðir hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt
- Avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, ið ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir hjá kommunum eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
- Ávísar avgerðir hjá Familjufyrisitingini – t.d. um barnagjald og samveru

Í Skatta- og avgjaldsmálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um toll-, skatta- og avgjaldsviðurskifti.
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjøld við skráseting av akførum.

Í lendismálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá kommunum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir tinglýsingarlógini og lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir eftir lóg um eigaraíbúðir
- Avgerðir eftir lóg um bygging

Í lestrarstuðulsmálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá Studna eftir lóg um lestrarstuðul

Í vinnumálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá Akstovuni eftir ferðslulógini
- Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- Avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir
- Avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir kunngerð um vápnaprógv
- Harumframt viðger Føroya Kærustovnur kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftinum

Í psykiatriskum sjúklingamálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um nýtslu av tvingsli í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild.

- Tvingsilsinntrivini, sum kærast kunnu um, eru:
- Tvingsilsinnlegging
- Tvingsilsafturhald
- Afturføring
- Tvingsilsviðgerð
- Fastspenning
- Nýtslu av likamligum valdi
- Nýtslu av persónligum ávaringar- og peiliskipanum og serligum hurðalásum
- Verjufastspenning
- Persónlig vernd, ið uttan steðg varar meira enn 24 tímar og hurðalæsing á deildini

- Tvungna uppfylging eftir útskriving

Í skuldarumskipanarmálum viðger Føroya Kærustovnur umsóknir um eftirgeving og umskipan av skuld, sum persónar hava til landskassan:
- Skuld, ið Føroya Kærustovnur kann umskipa:
- Landsskattur og AM-gjald
- Meirvirðisgjald
- Tollur
- Lønarhæddaravgjald
- Framleiðslugjald
- Vinnulán og veðhald givin av Føroya Landsstýri
- Lestrarlán frá Studna
- Rentuskuld og skuld frá øðrum útreiðslum, ið eru knýttar at høvuðsskuldini

Í barnaverndarmálum tekur Føroya Kærustovnur avgerðir grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið viðvíkjandi:
- Umsorganaryvirtøku
- Samveruætt
- Familjuviðgerð á stovnum hjá landinum
- Dag- og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum, har samtykki ikki er fingið frá foreldramyndugleikanum ella barni yvir 15 ár
- Rættin til ókeypis umboðan í omanfyrinevndu málum

Í arbeiðsloysisskipanarmálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:
- Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini.

Í barsilsskipanarmálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:
- Avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í lógini um Barsilsskipan.

Í tvingsilsmálum viðger Føroya Kærustovnur tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum Føroya Kærustovnur eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.
Føroya Kærustovnur viðger tilmæli um:
- Flyting uttan samtykki
- Ávaringar- og peilingarskipan
- Serlig upplatingarskipan til úthurð
- Halda persóni aftur og føra hann aftur
- Halda persóni føtum í sambandi við reinføri o.a.
- Nýtslu av hjálparráði
- Forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon
- Kanning av býli og ognarlutum
- Leggja hald á ognarlutir
- Læsa býli um náttina

Í náttúruverndarmálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:
- Avgerðir, ið Umhvørvisstovan hevur tikið eftir náttúruverndarlógini ella reglum ásettum við heimild í lógini.